Álit

í

løgtingsmáli nr. 83/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan
(Ásetingar um næmingatal í hvørjum flokki)

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 7. mars 2024 og eftir 1. viðgerð 19. mars 2024 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. mars og 3. og 10. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri lærараútbúgvingina á Fróðskaparsetrinum, Skúlaleiðarafelagið, Føroya Lærarafelag, Kommunufelagið og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Undirvísingarstýrinum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sólvit E. Nolsø, Jóhannis Joensen, Súsanna Bertholdsen, Liljan Weihe og Erling Eidesgaard) hevur hesar viðmerkingar:

Eitt av tilmælunum í Fólkaskúlaálitinum, sum var handað landsstýrismanninum í 2023, var at lækka hægst loyvda næmingatali í flokkunum.

Grundgevingin fyri at lækka floksstøddirnar í føroysku fólkaskúlunum er millum annað, at tað er ein fortreyt fyri at náa tí einstaka næminginum, at flokkarnir ikki eru ov stórir, og at eyka læraratímar eru í flokkunum eftir tørvi.

Mælt verður til, at hægsta markið skal minka úr 24 næmingum og niður í 20 til 22 næmingar.

Gransking á økinum er ikki á einum máli um, hvønn týdning floksstøddin hevur á læringina og trivnaðin í skúlunum. Tó eru ábendingar um, at smærri flokkar hava ávísar fyrimunir við sær. Í smærri flokkum hevur lærarin betri tíð til hvønn einstakan næming, og við tí eru betri fortreytir fyri, at næmingar mennast á ymsan hátt. Kanningar vísa eisini, at í ávísum førum standa næmingar úr smærri flokkum seg betur enn næmingar úr størri flokkum.

Serliga hevur tað týdning í yngru flokkunum, at flokkarnir ikki eru ov stórir, meðan tað ikki er eins týdningarmikið í eldru árgangunum.

Fyrstu árini í skúlanum skulu í størri mun verða merkt av friði, møguleika til hugsavning og uppmerksemi frá lærara. Í eldru skúlaárunum eiga næmingar at verða komnir betur fyri seg og hugbindingarevnir, greiningarevnir og annað er ment meira.

Tað er tó ikki so knívskorið, at tað altíð loysir seg best at minka um floksstøddina. Avgerandi í nógvum førum er, at næmingar hava so góða atgongd til lærarar sum gjørligt. Tí siga kanningar eisini, at ofta loysir tað seg líka væl at seta inn við fleiri læraratímum og til dømis hava tveir lærarar inni í einum flokki, heldur enn at býta flokkin sundur.

Um ein flokkur riggar væl, hóast hann er í størra lagi, kann tað verða órógvandi at býta hann sundur. Tá hevði tað givið betri meining, at sett ein lærara inn afturat.

Niðurstøðan í Fólkaskúlaálitinum um broytingina í floksstøddini er eisini gjørd út frá tí sannroynd, at tað eru fleiri streingir í hesum málinum:

"Sostatt er niðurstøðan, at eitt átak at minka um floksstøddina sum eitt einstakt átak ger mun, men virknaðurin er munandi størri, um tað er partur av eini heildarbroyting, har dentur bæði verður lagdur á úrtøkuna hjá næminginum og trivnaðin."

At talan er um eitt fleirstreingjað átak, gekk eisini aftur undir hoyringunum í nevndini.

Høvuðsendamálið við lógaruppskotinum er eisini sagt at vera, at "*meira læraratíð verður til hvønn einstakan næming"*, og tað eru fleiri loysnir uppá tað.

Mestsum allir hoyringarpartar hava viðmerkt, at henda broytingin kundi ikki standa einsamøll, men at tað var av stórum týdningi, at eitt nú tvílæraraskipanin var víðkað um somu tíð, tí tað var ofta ein líka góður ella betri máti at tryggja meira læraratíð til hvønn einstakan næming.

Eisini er blivið nevnt, at flokslæraraskipanin átti at verið styrkt, so flokslærarin verður betur fyri at fara um ein flokk.

Tað stendur eisini nevnt í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at hetta uppskotið er eitt av fleiri, sum eru á veg um fólkaskúlan, eins og Fólkaskúlaálitið eisini leggur upp til, at tað skulu verða.

Verður uppskotið samtykt, kemur broytta skipanin at galda frá skúlaárinum 2025/26. Tískil skuldi verið tíð at gera aðrar neyðugar broytingar, sum skulu gerast, áðrenn lækkaða floksstøddin kemur í gildi.

Meirilutin heitir á landsstýrismannin um at virka fyri, at tvílæraraskipanin verður styrkt og víðkað, áðrenn skúlaárið 2025/26 byrjar, sum fleiri hoyringarpartar eisini hava lagt dent á, og sum eisini er í samsvari við niðurstøðuna í Fólkaskúlaálitinum.

Fígging skal finnast til øll átøkini. Umframt floksstøddina og tvílæraraskipanina, skal tímatalið í fólkaskúlanum eftir ætlan lækka skjótt eisini. Lækkaða tímatalið fer at leysgeva 4 mió. kr. um árið, meðan ein broyting í floksstødd úr 24 næmingum og niður í 20 næmingar kostar 4 mió. kr. um árið. At víðka tvílæraraskipanina kostar 2 mió. kr. um árið.

Fyri at hava størri vissu fyri, at fígging finst til eina víðkaða tvílæraraskipan, fer meirilutin at mæla til, at markið á floksstøddini minkar niður í 22 heldur enn 20. Við tí liggur hægst loyvda floksstøddin framvegis innanfyri tey mørk, sum Fólkaskúlaálitið metir vera ráðiligt og gott fyri næmingin, umframt at kostnaðurin fer úr 4 mió. kr. og niður í 2,6 mió. kr. Tað átti at givið landsstýrismanninum frægari fíggjarligt rásarúm at seta onnur neyðug tiltøk í verk.

Ivamál eru eisini reist undir hoyringum um orðaljóðið í uppskotinum.

Í galdandi lóg er ásett, at næmingatalið *eigur* vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokki, meðan tað eftir uppskotinum verður ásett, at tá næmingatalið rakar loftið, *kann* skúlaleiðarin avgera at býta flokkin í tvey. Føroya Lærarafelag hevur viðmerkt, at orðið *kann* er ov veikt, men í viðmerkingunum til uppskotið sæst, at í tí liggur, at skúlin kann gera av, um ein flokkur skal býtast upp ella seta onnur tiltøk í verk til dømis við eyka lærarum. Tí heldur meirilutin, at orðið *kann* hevur somu merking sum *eigur* og kann verða standandi óbroytt.

Tó er meirilutin samdur við Føroya Lærarafelag í tí, at tað kann ørkymla, at § 20 í fólkaskúlalógini við orðingini um aðra fyriskipan verður broytt grundleggjandi. Aðrar fyriskipanir at seta inn í flokkin kann til dømis vera tvílæraraskipan, ein námsfrøðing ella onnur trivnaðarátøk.

§ 20 í galdandi lóg um fólkaskúlan snýr seg einans um floksstødd. Aðrar fyriskipanir eru skipaðar í øðrum lógum og kunngerðum og hava í útgangsstøðinum einki við floksstøddina at gera. Tí fer meirilutin at mæla til, at parturin um aðrar fyriskipanir verður tikin úr uppskotnu ásetingini, so greinin um floksstødd í fólkaskúlalógini verður verandi einans um tað.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður § 20, 1. pkt. orðað soleiðis: “Er næmingatalið í flokkinum hægri enn 22 við skúlaársbyrjan, sum er hámarkið, kann skúlaleiðarin avgera at býta flokkin í tveir flokkar.”

Viðmerkingar:
Við hesi broyting verður parturin um aðrar fyriskipanir sum alternativ til at býta flokkin sundur í tvey tikið úr uppskotinum. Harumframt verður markið fyri, nær flokkar vera at býta í tvey hækkað úr 20 upp í 22, soleiðis at flokkar við næmingatali á 23 ella hægri kunnu býtast í tvey. Eisini verður í ásetingini undirstrikað, at talan er um eitt hámark fyri floksstødd.

Jóhannis Joensen hevur harumframt hesar viðmerkingar:
Fólkaskúlin er ein av grundsúlunum í samfelagnum. Tað er tí av týdningi, at allir næmingar fáa somu lærarahjálp í undirvísingartímunum. Tímabýtið í dag leggur upp til ymiskt tímabýti alt eftir, hvussu stórir flokkarnir eru, men skúlastøddirnar í Føroyum gera tað soleiðis, at á t.d. summum skúlum hava seks næmingar ein lærara í øllum tímum, og í onkrum skúlum eru 15 næmingar um ein lærara í øllum tímum, og uppaftur á summum skúlum eru tveir lærarar til 27 næmingar í øllum tímum.

Hetta ger, at allir næmingar ikki fáa somu læraratíð pr. næming, tó at vit krevja tað sama frá øllum næmingum til prógvtøkur og royndir.

Tí má aðalmálið vera, at vit hava eitt javnari tímabýti, har allir næmingar í Føroyum fáa somu læraratíð pr. næming. Rættari sagt, at tað er ikki rætt, at tað í flokkum við somu stødd og avbjóðingum eru ymiskar tímajáttanir. Har annar flokkurin fær tveir lærarar og hin ein lærara.

Uppskotið hjá landsstýrismanninum gevur eitt munandi betri tímabýti til skúlar við flokkum omanfyri 22 næmingar. Hetta er gott, men tað kann ikki standa einsamalt, sum felags viðmerkingar meirilutans eisini vísa á.

Tað eru serliga miðalstóru skúlarnir, sum eru fyri vanbýti, tá tað kemur til læraratímar pr. næming í Føroyum, og hetta ger gjónna størri, um tvílæraraskipanin ikki verður styrkt munandi.

Tí verandi tvílæraraskipan er bert í 1. og 2. flokki og er bert galdandi frá næmingi nr. 17 við 5 tímum pr. viku. Tað vil siga, at næmingur í skúla, sum hevur floksstøddir frá 10 til 17 næmingar, onga eyka lærarahjálp fær í tímunum, ímeðan flokkar við 23 næmingum og fleiri fáa tímajáttan til tveir lærarar inni í flokkinum í øllum tímum frá 11. næmingi alla skúlatíðina; frá 1. flokki til 9. flokk.

Uppskotið gagnar serliga teimum stóru skúlunum í Føroyum, har næmingatalið í flokkunum er omanfyri 22.

Tað, sum manglar er, at tvílæraraskipan verður rullað út frá 1. fl. til 9. fl., har allir næmingar í Føroyum fáa somu normering frá 11. næmingi.

Ikki fyrr enn tá hava vit eina nøktandi og javna normering í fólkaskúlanum. Hetta krevur játtan á hvørjum ári komandi níggju árini.

Verður hetta ikki gjørt, hava vit ein ójavnan og órættvísan fólkaskúla, tá tað kemur til læraratíð pr. næming.

Við hesum ymisku viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Magnus Rasmussen og Bárður á Lakjuni) fegnast um, at landsstýrismaðurin tykist at hava sett sær fyri, at nú skal fólkaskúlin raðfestast. Tað er eingin loyna, at skúlin í langa tíð ikki tykist hava fingið ta raðfesting í politisku skipanini, sum hann átti at fingið. Skúlin er ein hornsteinur í samfelagi okkara, ein skipan sum nærum hvørt mansbarn í Føroyum skal ígjøgnum, og tí er tað so sera umráðandi, at vit altíð miða eftir at hava ein so góðan skúla, sum yvirhøvur gjørligt.

Í galdandi lógaráseting stendur, at við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið *vanliga* ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum. Henda orðing sum ovaramark fyri floksstøddina er greið, men í praksis hevur játtanarmyndugleikin ikki latið skúlunum játtan til tveir flokkar fyrr enn við 27. næminginum.

Á hendan hátt hevur lógin verið fyrisitin soleiðis, at ovaramarkið í veruleikanum hevur verið 26 næmingar í flokkinum og ikki 24 næmingar, sum lógin fyriskrivar. Nógv eru samd um, at tað er ov nógv við upp til 26 næmingum í hvørjum flokki, har tað er trupult hjá læraranum at røkka øllum 26 næmingunum, og tað er trupult hjá einstaka næminginum at vera sæddur og hoyrdur.

Høvuðsendamálið við uppskoti landsstýrismansins er, at meira læraratíð verður til hvønn einstakan næming. At náa hesum verður ovaramarkið fyri floksstødd í fólkaskúlanum eftir uppskotinum lækkað niður í 20 næmingar í hvørjum flokkinum.

Í tilmælunum frá 2023 er ein høvuðstáttur, at lærarin fær meiri tíð saman við tí einstaka næminginum. Við at minka um floksstøddina verður eitt stig tikið til at tryggja tí einstaka næminginum meira tíð við sínum lærara, so at næmingarnir fáa bøtt um umstøðurnar fyri at fáa betri úrtøku og betri umstøður at trívast í felagsskapinum í fólkaskúlanum.

Tilmælini um fólkaskúlan, sum landsstýrismaðurin fekk handað í 2023, leggja upp til nógv ymisk átøk, sum eiga at verða framd, og broytt floksstødd er eitt teirra.

Í uppskoti sínum mælir landsstýrismaðurin til, at í mesta lagi 20 næmingar skulu vera í hvørjum flokki, og harafturat ætlar landsstýrismaðurin at seta í gildi serliga fyriskipan.

Uppskotna ásetingin er soljóðandi:

"*Er næmingatalið í flokkinum hægri enn 20 við skúlaársbyrjan, kann skúlaleiðarin avgera at býta flokkin í tveir flokkar ella seta aðra fyriskipan í verk, undir hesum tvílæraraskipan o.a.*".

Hóast tankin allarhelst er góður, so er minnilutin ikki heilt samdur við lógaruppskotinum hjá landsstýrismanninum. Har eru fleiri viðurskifti, sum gera seg galdandi:

- Uppskotið sigur: "*....kann skúlaleiðarin avgera...*". Tað er ikki rætt at áleggja skúlaleiðaranum eina uppgávu, sum skúlaleiðarin í roynd og veru ikki hevur myndugleika til, tá samanum kemur, tí tað er jú í síðsta enda altíð játtanarmyndugleikin, sum stendur við ábyrgdini at játta tað, sum skal til.

- Uppskotið sigur: "*Er næmingatalið ... hægri enn 20... kann... ella seta aðra fyriskipan í verk...*". Ovaramarkið fyri floksstødd verður í roynd og veru strikað, um bara "onnur fyriskipan" verður sett í verk. Tað er týdningarmikið, at tað er eitt týðiligt ovaramark fyri næmingatalinum í hvørjum flokki, og tað markið fellur burtur við uppskoti landsstýrismansins.

- Uppskotið nýtir orðingina "*kann býta*" í mun til floksstøddina, og tað metir minnilutin ikki vera nóg greitt ella sterkt orð í lógarteksti sum hesum. Greiðari er at nýta orðið "*eigur*" og at umorða lógargreinina, so at hon heldur leggur seg upp at tí, sum vit kenna frá galdandi lógaráseting.

- Uppskotið nevnir einki um, hvussu verður við verandi næmingum og floksstøddum, sum ikki verða fevnd av nýggju lógini í skiftistíðini frá verandi til nýggju skipanina. Hetta kann ikki vera rætt.

Minnilutin hevur tí eitt broytingaruppskot, sum tekur hædd fyri hesum viðurskiftum.

Minnilutin er samdur við meirilutanum í, at orðingin hjá landsstýrismanninum um at "*...seta aðra fyriskipan í verk...*" ikki hoyrir heima í júst hesi lógaráseting, sum snýr seg um floksstødd. Tískil tekur minnilutin undir við meirilutanum í, at hesin partur verður tikin burturúr uppskotinum.

Meirilutin hevur eisini mælt til, at ovaramarkið fyri floksstødd verður 22 heldur enn 20, og tí tekur minnilutin eisini undir við. Ovaramarkið fyri floksstøddini í fólkaskúlanum verður sostatt lækkað úr 24 og niður í 22 næmingar við skúlaársbyrjan.

Við støði í omanfyristandandi snýr broytingaruppskot minnilutans seg um at fáa lækkað ovaramarkið fyri floksstødd niður á 22 næmingar heldur enn 20 næmingar, sum landsstýrismaðurin skjýtur upp; men fylgja vit tilmælunum um broytingar í fólkaskúlanum, er hetta bert fyrsta stig á leiðini ímóti einum enn betri fólkaskúla.

Í galdandi lóggávu stendur, at við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum. Henda skipan verður við broytingaruppskoti minnilutans framvegis galdandi fyri næmingar, sum virka undir verandi skipan, inntil nýggja skipanin er endaliga sett í gildi.

Tað er týdningarmikið, at tað er eitt týðiligt ovaramark fyri næmingatalinum í hvørjum flokkinum, so at næmingatalið í flokkinum ikki kann fara upp um tað talið, sum lógin setur sum ovaramark.

Við uppskotinum verður tað 23. næmingurin, ið eftir nýggju skipanini útloysir játtan til nýggjan flokk, og tað inniber ein meirkostnað, tí við verandi lóggávu og siðvenju er tað tann 27. næmingurin, ið útloysir játtan til nýggjan flokk.

Nýggja skipanin verður galdandi frá skúlaárinum 2025/2026. Tá verður byrjað við 1. flokki, og skipanin verður síðan rullað út yvir níggju ár og soleiðis sett fult í gildi eftir hetta áramál.

Lógarbroytingin tryggjar skúlunum játtan til tveir flokkar við 23. næminginum, og sambært lógargreinini er galdandi, at næmingur nummar 23 útloysir, at flokkurin verður býttur sundur í tveir flokkar við ávikavist 11 og 12 næmingum í hvørjum.

Tó, so eru tað støður og flokkar, har ein ella tveir næmingar koma aftrat, og flokkurin er ein væl virkandi heild, sjálvt um næmingatalið verður 24 næmingar. Tá eigur tað at vera heimild til, at flokkurin framvegis virkar sum ein flokkur, men í teimum serstøku førunum eru tað tveir lærarar í flokkinum. So í staðin fyri, at ein lærari er í einum flokki við 11 næmingum, og hin í flokkinum við 12 næmingum, so eru báðir lærararnir saman í eini tvílæraraskipan í flokkinum við 23 næmingum.

Avgerðin um at loyva 23 ella fleiri næmingum at vera í flokkinum eigur at vera tikin í serstøku umstøðunum í flokkinum og í skúlanum, virkar flokkurin t.d. betur saman enn býttur upp í tveir flokkar, eru høligumstøðurnar í skúlanum egnaðar at hava so nógvar næmingar í flokkinum og so framvegis.

Orsøkin til, at skúlarnir eiga at hava heimild til at velja ímillum at býta flokkin í tveir flokkar við 23. næminginum ella at varðveita flokkin sum ein við tvílæraraskipan í øllum tímunum er, at tað ikki altíð er mest skynsamt at býta ein flokk upp.

Broytingaruppskot minnilutans hevur við sær, at tað frameftir skulu vera tímar tøkir til tveir flokkar, tá næmingatalið við skúlaársbyrjan er meir enn 22. Við hesum verður tryggjað meira læraratíð til einstaka næmingin.

Teir næmingar, sum eru undir verandi skipan, mugu varðveita sítt lógarásetta ovaramark fyri floksstødd. Tískil verður hetta við broytingaruppskoti minnilutans sligið fast við at skoyta eina skiftisreglu uppí, har gjørt verður púra greitt, at við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum. Henda skipan verður framvegis galdandi fyri næmingar, sum virka undir verandi skipan, inntil nýggja skipanin er endaliga sett í gildi.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1 verður § 20, 1. pkt. orðað soleiðis: "Við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið ikki at fara upp um 22 í hvørjum flokkinum."
2. § 2 verður orðað soleiðis:
   "
   § 2
   Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2025.
   Stk. 2. Næmingatal fyri skúlaflokkar, ið ikki eru fevndir av § 20, 2. pkt., verður viðgjørt eftir áður galdandi reglum."

Viðmerkingar:
Til nr. 1
Við hesi broyting verður hildið fast við galdandi lógaráseting, har "vanliga" tó verður tikið burturúr, og hámarkið á 24 næmingar lækkað niður í 22 næmingar. § 20, 2. pkt í uppskotnu ásetingini hjá landsstýrismanninum verður tó standandi óbroytt, og nýggja skipanin sostatt innførd í stigum eftir níggju árum.

Til nr. 2
Gildiskomuásetingin verður broytt, soleiðis at núverandi hámark á 24 næmingar framvegis verður galdandi fyri næmingar, sum virka undir verandi skipan, inntil nýggja skipanin er endaliga innførd eftir níggju árum.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 14. mai 2024

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	